Landsstýrið:

# Stendur saman um bústaðarpakka

**Húsalánsgrunnurin og Íbúðargrunnurin skulu seljast og eitt bústaðarfelag, sum verður eitt alment partafelag, fær til uppgávu at fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi**

BÚSTAÐARPAKKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur nú sett út í kortið, hvussu bústaðarpolitikkurin ætlandi skal verða komandi árini, og á tíðindafundi í Almanna-og Heilsumálaráðnum mánamorgunin varð ætlanin løgd fram.

- Vit halda, at hetta kann gerast størsta bústaðarpolitiska frambrotið í Føroyum seinastu árini, sigur landsstýrismaðurin, sum varðar av málinum, Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin vísir á, at hann seinasta árið hevur arbeitt við at finna eina semju í samgonguni um eina bústaðarpolitiska ætlan, sum nú verður rópt "Bústaðarpakkin".

- Nú er komið á mál við politiska arbeiðnum, og ein avtala er gjørd í samgonguni um, hvussu fram skal farast, sigur hann.

### Í 6 punktum

Høvuðsætlanin hjá landsstýrinum er í seks punktum.

Í fyrsta lagi skulu Húsalánsgrunnurin og Íbúðargrunnurin seljast, soleiðis at 2/3 av søluvirðinum fara til rindan av skuld hjá landskassanum. Seinasti triðingurin av avlopinum fer í eitt nýtt alment partafelag – eitt Bústaðarpartafelag, sum fær til uppgávu at fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi.

Í øðrum lagi verður Bjálvingarstuðulsgrunnurin tikin av, og nýggja Bústaðarpartafelagið fær eisini uppgávuna at veita avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk til fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar, sum búgva í egnum bústaði.

Í triðja lagi verður gjørd ein lóg um lutaíbúðarfeløg, og henda lóggáva skal bæði verða karmur um vanlig lutaíbúðarfeløg og serlig lutaíbúðarfeløg, sum ætlandi skulu standa fyri bústøðum til fólk við serligum tørvi.

Á tíðindafundinum segði landsstýrismaðurin, at tað í fyrsta lagi verður neyðugt at sleppa um tey "keðiligastu" punktini í ætlanini, sum eitt nú er at selja Húsalánsgrunnin, Íbúðargrunnin og Bjálvingarstuðulsgrunnin.

Í fjórða lagi fer landsstýrið at broyta MVG-lóggávuna og rentustuðulslóggávuna, soleiðis at lutaíbúðarfeløg fáa somu rættindi og skyldur sum tey, ið byggja privat sethús.

Í fimta lagi verður nýggj føroysk leigulóg fyri privatar bústaðir gjørd, og hendan skal tryggja rættindini hjá leigarum og útleigarum.

Í sætta og seinasta lagi fer landsstýrið at skjóta upp at broyta skattalóggávuna soleiðis, at skatting av leiguinntøku, ið stavar frá útleigu til privatar bústaðir, verður á sama støði sum vanligur partafelagsskattur.



*Samgongan er samd um "bústaðarpakkan", sum mánamorgunin varð lagdur fram á tíðindafundi*

*Mynd: Bárður*

### Nýtt mynstur

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, helt á tíðindafundinum, at hesi stig skuldu kunna sett ferð á ein broyttan bústaðarpolitikk í Føroyum, sum verður betur lagaður til umstøðurnar hjá fólki – tað veri seg hjá ungum sum gomlum eins og hjá fólki við serligum tørvi.

Lisbeth L. Petersen, sum var við á tíðindafundinum, segði, at tosað hevur leingi verið um broyttan bústaðarpoliktikk, og hon fegnaðist um, at ætlaði politikkurin nú er í einum samlaðum "bústaðarpakka", sum hon helt bert kundi gerast eitt framstig.

Jørgen Niclasen umboðaði eisini samgonguna á tíðindafundinum.

- Við hesum fáa vit ein nógv breiðari bústaðarmøguleika, og eg fegnist um, at vit sambært ætlanini eisini fáa ein lægri skatt á leigu. Nú fer tað at loysa seg betur at leiga íbúðir út og við tað, at útboðið verður størri, vænti eg, at leiguprísirnir eisini verða lægri, segði Jørgen Niclasen.

# Minni gróður á landgrunninum í ár

**- Vit høvdu vónað, at gróðurin á landgrunninum í ár var nakað yvir miðal, men nú úrslitini fyriliggja, vísir tað seg, at gróðurin er nokso fitt undir miðal. Tað er ikki júst hetta, vit hava brúk fyri beint nú, heldur Eilif Gaard, fiskifrøðingur**

GRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú úrslitini av gróðurmátingunum hjá Fiskirannsóknarstovuni fyriliggja, hevur stovnurin staðfest, at gróðurin á landgrunninum í ár er nokso fitt minni enn eitt miðalár. Hetta svarar ikki til tað, sum annars hevur verið hildið um lívfrøðiliga grundarlagið í løtuni. Mett hevur nevniliga verið, at grundarlagið hevur verið rímiliga gott, og at fiskurin tí hevur trívist væl. Nú vísa so gróðurmátingarnar, at grundarlagið kortini ikki er so gott, sum hildið hevur verið.

Eilif Gaard, fiskifrøðingur, sigur, at Fiskirannsóknarstovan leypandi kannar gróðurin á landgrunninum, og ein týðandi partur av hesum kanningum er sjógvurin, sum verður pumpaður upp á Lívfiskastøðini í Skopun.

- Vit fáa royndir sendandi av hesum sjógvi, sum vit síðan máta fyri gróður.

Hann sigur, at tað kemur eitt sindur dátt við, nú endaligu kanningarnar vísa, at gróðurin er nokso fitt minni enn eitt miðalár.

### Yngul og æti

Eilif sigur, at seinastu kanningarnar, sum Fiskirannsóknarstovan ger á hvørjum ári til tess at staðfesta endaligu tølini, er yngul-og ætikanningar við Magnusi Heinasyni.

- Í endanum av juni mánaða fer Magnus Heinason um allan landgrunnin, har yngul-og ætikanningar verða gjørdar. Hetta er líkasum hæddarpunktið, ið saman við kanningunum av sjógvi úr Lívfiskastøðini í Skopun, er grundarlagið undir úrslitinum.

Fiskifrøðingurin sigur, at stovnurin brúkar eitt sonevnt index-tal til at áseta góðurin, og eitt miðal ár er gróðurin soleiðis 8,97.

- Í fjør var gróðurtalið 10,6 og soleiðis væl yvir miðal, men í ár vísa mátingarnar, at talið bert er 6,98 – ella tvey tøl minni enn eitt miðalár. Í 2002 var gróðurin rættiliga lítil; tá var gróðurtalið 3,6.

Sjálvur hevði Eilif væntað, at talið fór at vera nakað yvir miðal í ár, men nú tikið er saman tær mátingar, sum Fiskirannsóknarstovan ger, er veruleikin ein annar.

- Hetta er ikki júst tað, sum vit hava mest brúk fyri í løtuni, heldur Eilif Gaard fyri.

### Sæst aftur

Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt gróðurkanningar seinastu 15 árini, og líkt er til, at hesar kanningar eru eitt rættiliga gott "barometur" fyri, hvussu lívfrøðiliga grundarlagið á landgrunninum er.



*Útlitini eru ikki so góð, sum hildið hevur verið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Eru gróðurtølini høg, gerst fiskurin feitur, men eru gróðurtølini lá yvir longri tíð, sæst hetta aftur í, at fiskurin verður meira rak sum frá líður, sigur fiskifrøðingurin og vísir á, at hetta kanska serliga sæst aftur í, hvussu toskurin verður fyri.

Hann sigur, at "forskotið", sum hann rópar tað, er eini 2-3 ár í mun til gróðurin.

Eilif Gaard heldur, at tað hevur sína ávirkan á gróðurin, hvussu "nógv" sjógvurin á landgrunninum verður skiftur út.

- Verður sjógvurin nógv skiftur, darvar hetta eftir øllum at døma gróðrinum, sigur hann.

Fiskifrøðingurin vísir á, at torført er at meta um øll viðurskifti í havinum, fyrr enn ein tíð er fráliðin.

- Tí kunnu vit bert vóna, at gróðurin á landgrunninum mennist aftur, sigur Eilif Gaard.